

*Eini 60 fólk vóru við í NM í Havn, og tey kappaðust av lívsins kreftum*



*past til slíka boccia-kapping í Føroyum eru góðar, og fyrireikingin*

# ey heiðursmerki

**Heiðursmerki til Føroya**
Tað var roknað við, at Áki Joensen fór at standa seg væl í kappingini, og tað eydnaðist eisini honum at vinna bronsu í klassa 1 við rennu. Áki varð bæði fegin og errin, tá ið hann fekk bronsumerki hongt um hálsin.

Hinvegin var tað rímiliga óvæntað, at føroyska liðið vann bronsu í bólki 2. Her gekk sera væl hjá føroyska liðnum, um vann seg framm millum tey fremstu.

Tá ið Føroyar vóru við NM í boccia í Finnlandi fyri tveimum árum síðani, vunnu Føroyar einki heiðursmerki, so hesaferð gekk munandi betri enn seinast.

Næsta NM-kappingin í boccia verður um tvey ár, og tá skal hon ætlandi haldast í Danmark.

Føroysku boccia-spælararnir venja gjøgnum allan veturin. Vant verður í samstarvi við kvøldskúlan, men undan NM-kappingini hevur landsliðið verið saman fleiri ferðir um vikuna. Tað hevur eftir øllum at døma gjørt góðan mun, tí úrslitið var gott.

